

# Íslendingar stuðla føroyskum EFTA limaskapi

Meðan íslendingar eru fúsir at hjálpa Føroyum í EFTA-spurninginum, so er Noreg trekari. Teir vilja ikki stuðla Føroyum uttan, at Sveis eisini tekur undir við føroyskum limaskapi. (Rubrikk)

Í samband við Norðurlandaráðsfundin hittust stjórnarleiðararnir í Norðurlondum á fundi týsmorgunin. Á fundinum greiddi løgmaður frá føroysku evropastrategiini, ið fevnir um EFTA-limaskap og eitt víðkað samstarv við ES. Løgmaður legði serliga dent á, at Føroyar í løtuni arbeiða miðvíst ímóti føroyskum limaskapi í EFTA – og íslendski forsætisráðharrin, Geir M. Haarde, var skjótur at veita sín stuðul.

- Vit stuðla Føroyum av fullum huga, og satt at siga høvdu vit roknað við, at hetta fór at verða einfalt at fáa í lag, nú Danmark og Føroyar eru samd. Vit mæla til, at ein arbeiðsbólkur verður settur í EFTA at viðgera føroyska ynskið, sigur Geir M. Haarde.

Norski forsætisráðharrin, Jens Stoltenberg, var kortini eitt sindur trekari. Hann segði, at Noreg sum útgangsstøði tekur undir við føroyskum limaskapi, men so krevst eisini, at Sveits tekur undir við føroyska ynskinum.

**-páll**

## Hava áður gjørt bart

Støðan, sum Sp/f Ítróttarvedding nú er komin í, er sum so ikki eindømi. Fyri nøkrum árum síðani hevði útlendskur útbjóðari stovnað konto í Føroya Sparikassa, og umvegis hesa kundu teir so bjóða spæl út til føroysk viðskiftafólk.

Hetta varð tó steðgað, tá Ítróttarvedding umvegis politiska myndugleikan og skattavaldið fekk trumfa galdandi reglugerðina ígjøgnum.

– Tú kanst ikki hava eina konto í føroyskum peningastovni, uttan at tú hevur V- ella P-tal. Toll- og Skattstovan útflýggjar V-tal, men tá tað stendur í lóggávuni, at vit hava einkarrætt at fyriskipað spøl, so var ikki lógligt at geva hetta V-tal. Og tí steðgaði tað virksemið eisini, sigur Petur Elias Petersen

**-mørk**

---

## Fakta

Føroyska lógin um ítróttarvedding staðfestir, at Sp/f Ítróttarvedding hevur einkarætt at fyriskipa spæl á føroyska marknaðinum. Tó er eisini lógarheimild til spæl hjá Kringvarpinum (V4 og Gekkur) og hjá Happadráttinum.

Onnur loyvi kunnu latast til hvønn einstakan drátt sær, og kunnu hesi bert verða givin til almannagagnlig ella góðgerandi endamál.

Feløg og líknandi, sum er skattafræls (ítróttafeløg, áhugafeløg v.m.) kunnu uttan loyvi skipa fyri eydnuspæli eina ferð um árið, tó treytað av, at ávísar skyldur verða hildnar.

Vinnurekandi kunnu ikki útflýggja vinningar eftir skipan, sum er heilt ella partvíst tilvildarlig. Tó kunnu blaðútgevarar og útgevarar av regluligum tíðarritum skipa fyri eydnaspølum, har vinningar verða útflýggjaðir.

# Ítróttarvedding fylgir gongdini

**Enn hevur Sp/f Ítróttarvedding ikki tikið ítøkilig stig at melda aðrar útbjóðarar. Men tey fylgja sera væl við í gondini, sigur stjórin, Petur Elias Petersen**

VEDDING

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Einasti útbjóðarin, sum hevur loyvi at fyriskipa spøl á føroyska marknaðinum, er Sp/f Ítróttarvedding. Tey umsita spølini hjá Danske Spil – fyrr Tipstjenesten – og tí hevur tað sera stóran prinsipiellan týdning, tá onnur royna at vinna seg inn á føroyska marknaðin.

– Tað sigur seg sjálvt, at vit fylgja gongdini á marknaðinum. Tú skalt minnast til, at hetta er lógarregulerað økið, og í verandi støðu eru vit tey einastu, sum hava hetta loyvið, sigur Petur Elias Petersen, sum er stjóri á Sp/f Ítróttarvedding.

### Monopolið hevur orsøk

Júst monopol-viðurskiftini eru tó ikki tey, sum hann peikar mest eftir, tá útlendskir kappijngarneytar verða nevndir. Heldur vil hann seta fokus á orsøkina til monopolið.

– Soleiðis sum veddingarskipan okkara er, so burdi tað havt almennan áhuga, at talan er um regulerað viðurskifti. Hóast vit ikki hava nakra ítøkiliga kanning fyri føroyingar, so siga tøl alla aðrastaðni, at hvør íbúgvi spælir fyri einar 2.000 kr. um árið í miðal. Og tá er alt roknað við – lutaseðlar, bingo, ítróttarvedding, lotto o.s.fr. Tað vil við øðrum orðum siga, at í alt verða knappar 100 mió kr. um árið nýttar til hetta.

– Og teir pengarnir fara onkursvegna í umferð – hvørt vit vilja tað ella ikki. Men við skipanini hjá okkum ber so til at halda hetta í eini skipan, har peningurin kemur samfelagnum til góðar. Umframt at luta 45% út aftur sum vinningar, fer yvirskotið hjá Danske Spil út til sonevnd »alment nyttige formål«. Tað hava vit sæð her heima við, at vit á hvørjum ári hava givið pening til føroyskan ítrótt, til Føroya Ungdómsráð (FUR) og til Mentamálaráðið. Til samans hava hesar upphæddir táttað í 10 mió kr., so tað er altso ikki einki, sum vit tosa um.

– Útlendskir útbjóðarar kappast við at hava eina hægri útlutan av vinningum – upp í 55% - og tað gevur størri vinningar til spælaran. Men tú skalt minnast til, at hini 45% tá øll verða nýtt at skapa vinning til felagið – og altso ikki til samfelagið. Og tað í sjálvum sær skuldi fingið politikkarar at ansa eftir. Ikki minst, tá okkara skipan automatiskt syrgir fyri, at landskassin fær síni 15% í skatti av vinninginum, og tað ivist eg í er galdandi fyri tað, sum verður vunnið gjøgnum aðrar útbjóðarar.

– Og tað eru eisini hesi viðurskifti, sum gera, at eitt nú danskir myndugleikar ikki vilja boyggja seg fyri ES-kravinum um ein opnan spælimarknað.



*Tað er neyðugt at fáa staðfest, hvørjar reglur er galdandi og ikki á økinum, sigur stjórin í Sp/f Ítróttarvedding*

### Mugu staðfesta reglurnar

Hvørt nøkur politisk reaktión kemur upp á lýsingarnar, sum hava verið at sæð seinasta mánaðin, ber tó illa til at siga. Finn Ougaard, varafúti, segði í blaðnum í gjár, at talan er um eina grásonu, og tí skoðsmálinum eru Petur Elias ikki heilt ósamdur í.

– Men júst tað ger eisini, at tað hevur týdning at fáa staðfest, hvat er loyvt og ikki. Letur tú bara tingini flóta, so kanst tú í ringasta føri standa í teirri støðu, at føroyskur ítróttur og ungdómsarbeiði missur úti við 10 mió kr. árliga!

*Men hvørji ítøkilig stig kunnu tit taka í so máta?*

– Fyrst og fremst, so er tað at fylgja væl við tí, sum fyriferst á økinum. Og so royna at gera okkara ávirkan galdandi. Tí vit síggja hetta eins nóg sum eina politiska uppgávu. Í Danmark er tað jú staðfest við dómi, at tað er ólógligt at lýsa í donskum miðlum. Tann spurningin hava vit so ikki fingið avgreiddan enn.

*Tað vil so siga, at tað verða ikki tit, sum melda Dimmalætting ella FSF fyri tær lýsingar, sum hesi hava borið?*

– Tað fái eg sum so ikki svarað fyri. Um tað kemur so langt, er ein spurningur, sum nevndin tekur støðu til.

*Men kunnu vit ímynda okkum, at einki verður gjørt, og at eitt fótbóltsfelag brádliga spælir við lýsing fyri eitt nú Ladbrokes á bringuni. Er tað tá ikki ov seint at gera nakað?*

– Kemur tað hartil, so hava vit í øllum førum ein stóran trupulleika. Júst tann spurningurin er tó meira hypotetiskur, tí tá vil viðkomandi felag standa í eini støðu, har tey móttaka pening frá Danske Spil, samstundis sum tey undirgrava teirra virksemi, og tað ber jú illa til at selja somu tvær ferðir, sigur altso stjórin á Sp/f Ítróttarvedding.